Lazarus – fyrsti bilur í Vágum

Sløk 80 ár eftir, at fyrsti bilur kom í Vágoynna, varð loksins »landfast« millum Vágoynna og meginlandið í Føroyum

BILASØGU
Eirikur Lindenskov

Í junimánaði komandi verða liðin 80 ár síðani, at fyrsti bilur kom til Vágar. Tað var ein Fort T lastbilur – helst av sama slagi, sum bilurin hjá Hans Elmar Poulsen á Vatnsoyrum, sum var týsdagin var hin fyrsti, ið alment koyrdi gjøgnum Vágatunnilin.

Einar Petersen, sáli, í Sørvági, hevur latið Føroya Ellisakførum sera forkunnugt tilfar um bilasøguna í Vágum. Har greiðir hann m. a. frá um fyrsta bilin, sum skjótt fekk navnið Lázarus.

Bilurin varð keyptur gjøgnum Vilhelm Nielsen og Wenzel Petersen í Havn. Hetta var í juni í 1923.

Dimmalætting skrivar 6. juni í 1923, at tveir bilar hesaferð komu við Mýlingi til Føroya. Annan fekk Jákup Hendrik Isaksen í Søldarfirði, meðan hin var til eitt til endamálið stovnað partafelag í Vágum.

Partafelagið í Vágum er felagi »Krúnan«, ið Miðvingar stovnaðu til tess at keypa bil til oynna.

Bilurin kostaði 5.000 krónur.

Nógv fólk varð komið saman við atløgubrúnna hjá Andriasi, tey róptu, ið lá upp við Tóra-pakkúsi, tá skipið kom á Miðvág við bilinum. Hann varð førdur í land við lossijaktini.

Tíverri vita vit ikki um nakra mynd frá hesi stóru hending í Vágum, men um onkur eigur eina, frætta vit fegin.

Við snildum og handamakt varð bilurin fingin upp á land. Brúgvin var rættuliga góð og sterk, togendar vórðu lagdi rum bilin, og so varð hálað og skumpað undir, og lagt var undir hjólini sohvørt.

Sum vera man var eingin, ið dugdi at koyra bilin í Vágum, men hann var kortini fingin niðanfrá, og seinni var ein bilskúrur bygdur á leið har, sum skúlin er í dag.

Hvat var av Lazarusi, vita vit ikki at siga, men Krúnan í Miðvági keypti so ein annan bil í 1930.

Lazarus, róptu vágafólk fyrsta bilin í oynni, sum kom til Miðvágs fyri skjótt 80 árum síðani. Tað var ein 1/2 tons lastbilur, ein Ford T, sum her sæst uttan fyri snikkaravirkið við Gjónna

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum at okkara elskaði maður, pápi, verfaðir og abbi

Leivur Elias Joensen
Oyri

andaðist í heiminum mánadagin 9. desember, 59 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr heiminum í kirkjuna hósdagin 12. desember kl. 13.00.

Familjunnar vegna

Knúdina, Anna, Jóannis, Sámal, Maria og Elias

Tey, ið vilja minnast Leivur kunnu lata eina gávu til Føroya Felag móti Krabbameini. Konto í peningastovnunum.

Ferðaætlan

Nýggj royndarferðaætlan frá 10. desember 2002



Leið 300 (Bø - Tórshavn)

Dagur	Bø	Sørvág	Flogvøllurin	Miðvág	Sandavág	Statoil st.	Kollaf. Tunnilin	Tórshavn
x	06:35 *	06:45	06:50	06:55	07:00	07:20	07:25	07:45
x67		08:00	08:05	08:10	08:15	08:35	08:40	09:00
x		09:00	09:05	09:10	09:15	09:35	09:40	10:00
7			10:15 ✈	10:20	10:25	10:45	10:50	11:10
15			10:30 ✈	10:35	10:40	11:00	11:05	11:25
x6			11:00 ✈	11:05	11:10	11:30	11:35	11:55
14			13:45 ✈	13:50	13:55	14:15	14:20	14:40
x67		14:00	14:05	14:10	14:15	14:35	14:40	15:00
x		16:00	16:05	16:10	16:15	16:35	16:40	17:00
x67			17:00 ✈	17:05	17:10	17:30	17:35	17:55
x	17:50 *	18:00	18:05	18:10	18:15	18:35	18:40	19:00
67	18:50 *	19:00	19:05	19:10	19:15	19:35	19:40	20:00
145			20:30 ✈	20:35	20:40	21:00	21:05	21:25

Leið 300 (Tórshavn - Bø)

Dagur	Tórshavn	Kollaf. Tunnilin	Statoil st.	Sandavág	Miðvág	Flogvøllurin	Sørvág	Bø
x	07:00	07:20	07:25	07:45	07:50	07:55	08:00	
x67	09:00 ✈	09:20	09:25	09:45	09:50	09:55		
x67	09:30 ✈	09:50	09:55	10:15	10:20	10:25	10:30	10:40 *
14	12:00 ✈	12:20	12:25	12:45	12:50	12:55		
1	12:30 ✈	12:50	12:55	13:15	13:20	13:25		
x67	13:00	13:20	13:25	13:45	13:50	13:55	14:00	
x67	15:15	15:35	15:40	16:00	16:05	16:10		
x	16:15	16:35	16:40	17:00	17:05	17:10	17:15	17:25 *
x67	17:15	17:35	17:40	18:00	18:05	18:10	18:15	18:25 *
x	19:15	19:35	19:40	20:00	20:05	20:10	20:15	
67	20:00	20:20	20:25	20:45	20:50	20:55	21:00	

Leið 100 (Vestmanna - Tórshavn)

Dagur	Vestmanna	Kvívík	Statoil st.	Kollaf. Tunnilin	Tórshavn
x	07:00	07:15	07:25	07:30	07:50
x67	08:00	08:15	08:25 ¤	08:30	08:50
x	09:00	09:15 *	09:25 ¤	09:30	09:50
x	12:00	12:15 *	12:25	12:30	12:50
x	15:15	15:30 *	15:40	15:45	16:05
x	17:15	17:30	17:40	17:45	18:05
67	19:10	19:25 *	19:35 ¤	19:40	20:00

Leið 100 (Tórshavn - Vestmanna)

Dagur	Tórshavn	Kollaf. Tunnilin	Statoil st.	Kvívík	Vestmanna
x	07:00	07:20	07:25	07:30 *	07:50
x	08:00	08:20	08:25	08:30 *	08:50
x67	09:30	09:45	09:55 ¤	10:00 *	10:20
x	13:00	13:15	13:25	13:30 *	13:50
x67	16:15	16:30	16:40	16:45 *	17:05
x	18:10	18:25	18:35	18:40 *	19:00
67	20:00	20:15	20:25 ¤	20:30 *	20:50

Nýggj flogruta

Fuglafjørð - Leirvík - Flogvøllurin

Dagur	Fuglafjørð	Leirvík	Flogvøllin
x67	9:00	09:20	10:30

Flogvøllurin - Leirvík - Fuglafjørð

Dagur	Flogvøllin	Leirvík	Fuglafjørð
x67	11:00	12:25	12:45
x67	17:00	18:25	18:45

¤ Hetta merkir, at fólk mugu skifta bus við Statoilstøðina

* Hetta merkir, einans eftir tilkalling

✈ Flogruta. Hesar túrar kunnu broytast [illegible] í samband við flogferðslina

STRANDFARASKIP LANDSINS

www.ssl.fo - 34 30 30

MC Marjus

Vágalæknin og løgtingsmaðurin, Marjus Dam var, millum eirra, sum á motorsúkklu koyrdi gjøgnum Vágatunnilin, eftir at latið var upp týsdagin

VÁGATUNNILIN
Edvard Joensen

Vágar: Marjus Dam er farin at koyra á motorsúkklu. Men tað er ikki fyri at spara bummpengar í Vágatunlinum, leggur hann dent á.

Tað hevur verið skemtað dúgliga við, at løgtingsmaðurin hevur fingið sær motorsúkklu, eftir at tað gjørdist greitt, at motorsúkklur ikki skulu gjalda fyri at koyra gjøgnum Vágatunnilin.

Jú, hasa søguna hevur Marjus Dam eisini sjálvur hoyrt, og hann hevði væntað hana, sigur hann.

Men søgan er nú kortini heldur øðrvísi, greiðir hann frá.

– Tað er ein gamal dreymur, eg havi havt, síðan eg var eini 17-18 ára gamal, at eg skuldi hava eina motorsúkklu. Í summar, tá tað var greitt, at tunnilin fór at gerast veruleiki, gjørdi eg av at keypa eina motorsúkklu, sigur hann, og leggur aftur at, at hann veruliga vónaði, tá prísirnir fyri ferðslu gjøgnum Vágatunnmilin komu fram, at tað eisini fór at kosta nakað fyri motorsúkklur. Júst fyri at sleppa undan nøkrum tosi um, at hann vildi koyra fyri einki.

Marjus Dam sigur, at hann keypti e na 10 ára gamal súkklu, sum er mestsum ein japansk eftirgerða av eini Harley Davidson, og at hann hevur koyrt við henni í summar og í heyst.

– Tað vísir seg, at børnini eru eisini áhugað í henni, so tað er ein stuttleiki at hava hana í húsinum, tá fleiri vilja brúka hana.

Nú vetur er, stendur hon inni, sigur Marjus Dam, men týsdagin var hon kortini tikin fram í samband við, at Vágatunnilin varð latin upp.

Hann koyrdi við súkkluni í einum motorsúkklufylgi, sum fór ígjøgnum tunnilin. Fremstur í tí fylginum var tann 82 ára gamli Sverri Mortensen av Argjum á eini súkklu frá 1939.

Marjus Dam var ikki einsamallur á motorsúkklu síni hendan dagin. Við sær hevði hann 12 ára gamla sonin, sum eisini er áhugaður í súkkluni hjá pápanum.

Marjus Dam koyrdi á motorsúkklu gjøgmum, Vágatunnilin týsdagin

Mynd: Jens Kristian Dam

Plugntalk
GÁVUPAKKI

Í pakkanum er:
- Ein Nokia 3410
- 100 krónur teletíðarkort
- Stovning av teletíðarhaldi (200 krónur)
- Eyka kápa til telefonina

1399,-

TELEBÚÐIN
Tórshavn 317010
Miðvágur 332000
Klaksvík 457488
Sandur 361000
Tvøroyri 371000

FØROYA TELE